# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Undirbrotligheitin sigraði

Tað er í hesum døgum liðin fimm ár, síðan teir fyrstu fangarnir komu úr Afghanistan til Guantanamo. Her hava nú umleið 400 fangar sitið uttan lóg og dóm, og uttan at tað røkist fyri, at teir koma fyri ein løgligan rætt. USA sigur fangarnar verður yvirgangsmenn, og at neyðugt er av fyriliti fyri stríðnum móti altjóða yvirgangi at hava fangarnar innibyrgdar. Uttan mun til, hvørjar grundir USA hevur, so kann fangalegan ikki góðtakast. Hon er ósameinlig við fólkaræðislig principp, og legan minnir ikki sørt um kz legurnar í Triðja ríkinum. Afturat hesum kemur, at tað er prógvað, at fangar á Guantanamo verða torteraðir. Hetta er enta lógligt sambært ameriska lóg. So langt eru vit komin, so desperat er stríðið, at heimsins sterkasta fólkaræði er farið at verja seg við miðlum, sum ein bert kann vænta at finna í einaræðislondum! Hetta er stórt spell, og til skaða fyri fólkaræðið í vesturheiminum.

Amnesty International hevur gjørt vart við hetta óskilið, og víst á, at her verða framd grov brot á mannarættindi. A.I. í Føroyum hevur verið sera virkið og gjørt eitt megnararbeiði fyri at upplýsa føroyingar um støðuna á Guantanamo. Felagsskapurin hevur víst á, at her verða grundleggjandi mannarættindi brotin, og at hóast vit eru fá og smá, eiga vit at gera vart við okkum. Amesty hevur púra rætt og eiga allir føroyingar at bakka upp um felagsskapin, hvørs virki er okkum øllum til heiðurs.

Tað er tí eitt sera løgið samanfall av umstøðum, at júst sama dag, sum fangalegan á Guantanamo verður fimm ár, tekur løgtingsins uttanlandsnevnd avgerð um at longja loyvið hjá USA at lata henraðarflogfør nýta føroyskt loftrúm. Nú er føroyskt loftrúm enn danskt málsøki, men løgting og landsstýri verða spurd. Tað er valla nakar, sum ímyndar sær, at eitt føroyskt nei hevði forðað heimsins sterkastu hermegi at nýtt føroyskt loftrúm. Men eitt nei vildi havt stóran súmbolskan týdning. Kundi uttanlandsnendin ikki mannað seg upp til at siga nei, so kundi hon lagt treytir við, sum Amnesty hevur víst á. Uttanlandsnevndin kundi havt sett sum treyt fyri at viðmæla loyvið, at føroyskt loftrúm skal ikki nýtast til fangaflutning. Hetta hevði fræltst um allan heim og hetta hevði verið ein sigur fyrr A.I og øll, sum reka eitt mangan strævið og vónleyst stríð fyri mannarættindum. Men uttanlansnevndin stóð ikki royndina. Tann vanliga føroyska undirbrottligheitin sigraði og mannarættindini taptu. Hetta var mikið spell, og er okkum til lítlan sóma.

**Sosialurin**

## Veruligur skattapolitikkur 2004-2008

**BÁRÐUR NIELSEN**
Landsstýrismaður við fíggjarmálum



Samgongan hevur, sum hon setti sær fyri, ført ein veruligan skattapolitikk fyri at tryggja framhaldandi vøkstri í búskapinum. Endamálið er, at lønin ikki skal verða etin upp av harðari skatting og at tað skal loysa seg at arbeiða.

Skattalættar hava verið mest sum á hvørjum ári síðani miðskeiðis í 90-unum, men trupulleikin hevur verið, at skattatrýstið hóast skattalættar er økt. Orsøkirnar til tað eru m.a., at tað ikki hevur verið vilji ella dirvi til, at gjørt veruligar broytingar í okkara progressiva skattastiga hjá landinum.

Hetta settu vit okkum fyri at gera nakað við, og í høvuðsheitum snýr hetta seg um at dagføra okkara afturúrsiglda skattastiga og høga marginalskatt soleiðis, at tað altíð loysir seg at vinna nakrar eyka krónur. Ynskja vit búskaparvøkstur skal tað loysa seg at arbeiða.

**"Skattatalva"**
Fyri at geva eina greiða fatan av hvat ið tað merkir, at vit hava dagført skattastigan, verður víst til landsskattatalvuna.

Talvan vísir skattastigan fyri 2004 í mun til skattastigan 2008. Tað framgongur rættuliga týðuliga, hvar størsta broytingin fer fram, og er tað markið fyri, nær í ein inntøka skal rinda hægsta skatta % (marginalskatt). Hetta markið verður flutt frá kr. 170.000 upp til 270.000 og tað merkir, at allir teir størstu fakbólkarnir, m.a. arbeiðarar, handverkarar, sjúkrasystrar, lærarar, pedagogar og starvsmannafelagslimir sleppa undan at rinda toppskatt (hægsta marginalskatt). Herumframt verður hægsta skatta % lækkað við 3% frá 36% til 33%.

Aðrar broytingar eru m.a. at botnfrádrátturin verður hækkaður úr kr. 22.000 til 30.000 og merkir hetta, at av teimum fyrstu kr. 30.000 verður skattur ikki goldin. Inntøkuinntervallið, ið var kr. 65.000 til 120.000, er broytt til kr. 70.000 til 140.000 samstundis sum skatta % fyri hetta inntøkuinntervallið er lækkað við 1% frá 19% niður í 18%. Hetta merkir at tann parturin av inntøkuni millum kr. 70.000 og 140.000 sleppur lættari í skatti.

**Skattalættin til øll, ið rinda skatt**
Við gjøgnumførda skattalættanum hava vit givið skattalætta til tey, ið rinda bróðurpartin av samlaðu skattainntøkunum.

Við niðanfyristandandi talvu verður víst á, hvat ymsu bólkarnir rinda í skatti og hvussu stórur partur fer í ávíkavist landskassan og kommunukassan í 2006, roknað er við einum kommunuskatti uppá 20%. Aftast í talvuni framgongur, hvat skattalættin fyri árini 2006 til 2008 verður í krónum og prosentum, íroknað hækkaða inngjaldið í Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Sí talvu

Tað framgongur av talvuni, at tey, ið ikki rinda tað nógva í skatti, hava sjálvsagt ikki fingið størsta partin av lættanum, men tað hava tey, ið veruliga rinda skatt.

Sum eitt dømi kann nevnast, at um ein ið hevur eina inntøku uppá kr. 100.000 skal hann í 2006 gjalda kr. 8.480 í landsskatti, men hevur viðkomandi tvey børn, verður vegna barnafrádráttin uppá kr. 5.500 pr./barn útgoldið úr landskassanum kr. 2.520 (8.480-11000)

Eftir mínum tykki er tað soleiðis, at vit eiga øll at gjalda fyri landshúsarhaldið. Tað er eisini rímiligt og í lagi, at tey við teimum hægru inntøkunum rinda ein størri part av lønini í skatti. Men neyðugt er javnan at gera dagføringar í progressiva skattastiganum fyri at samlaða skattatrýstið ikki skal hækka og at allir inntøkubólkar ikki koma at gjalda toppskatt.

Hetta er ein neyðug broyting í okkara skattaskipan fyri at tryggja framhaldandi vøkstri í búskapinum. Endamálið er, at lønin ikki skal verða etin upp av harðari skatting, og at tað skal loysa seg at arbeiða.

**2006 Skattalætti 2006-2008**

| Inntøka | Landsskatt | Komm.skatt | Skattur íalt | Skatta % | Krónur | Prosent |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 50.000 | 1.680 | 4.800 | 6.480 | 13,0% | 705 | 10,9% |
| 100.000 | 8.480 | 14.800 | 23.280 | 23,3% | 330 | 1,4% |
| 200.000 | 29.680 | 34.800 | 64.480 | 32,2% | 980 | 1,5% |
| 300.000 | 63.080 | 54.800 | 117.880 | 39,3% | 9.030 | 7,7% |
| 400.000 | 97.080 | 74.800 | 171.880 | 43,0% | 9.280 | 5,4% |
| 500.000 | 131.080 | 94.800 | 225.880 | 45,2% | 9.530 | 4,2% |
| 750.000 | 216.080 | 144.800 | 360.880 | 48,1% | 10.155 | 2,8% |
| 1.000.000 | 301.080 | 194.800 | 495.880 | 49,6% | 10.780 | 2,2% |

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.